HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

26. mai 2017
Mál: 17/00430-4
Tygara skriv:
Viðgjørt: HH/khp

## Uppskot til kunngerð um fyribyrging og týning av rottu til hoyringar

Hoyringsfreistin er ásett til **fríggjadagin 23. juni 2017**.

Hjálagda uppskot til kunngerð um fyribyrging og týning av rottu, sum er ætlað at skula avloysa verandi rottukunngerð frá 1962. Endamálið við kunngerðini er í høvuðsheitum at:

- skipa betur fyribyrging og yvirvøku av rottufríu oyggjunum,
- nágreina praktisku og umsitingarligu uppgávurnar hjá kommunustýrinum í sambandi við rottutýning,
- lýsa ábyrgd hins einstaka í sambandi við fyribyrging og týning av rottu,
- tryggja betur innlit í rottustøðuna við fráboðanarskyldu til kommununa og skrásetingarskyldu hjá kommununi av móttiknum rottufráboðanum,
- landsmyndugleikin fær heimild at tilrættisleggja eina samskipaða rottutýning tvørtur um kommunu- og býarmørk í bygdum sum óbygdum øki,
- landsmyndugleikin innflytir og umsitur rottueitur og ger av, hvør strategi nýtast skal í rottutýningini.

Uppgávan at týna rottur liggur sambært uppskotinum framvegis hjá kommunum. Kommunan skal útvega og rinda fyri eitur, rottufellur og annað tilfar, sum verður brúkt í rottutýningini. Kommunurnar skulu eisini seta skikkað aktingarfólk at taka sær av uppgávunum sambært kunngerðini. Hvør bygd og hvør býur skal hava eitt aktingarfólk, sum tekur sær av kommunalu uppgávunum sambært kunngerðini.

Uppgávan hjá landsmyndugleikanum er meira yvirskipað. Landsmyndugleikin skal meta um, týningarætlanir, hvat slag av eitri brúkast skal, skipa fyri innflutningi, goymslu og útflýggjan av eitri til kommunurnar, gera vegleiðing um at handfara og leggja eitur út, hvussu farast skal fram, um fráboðan er um rottu á rottufríu oyggjunum o.s.fr. Eisini skal landsmyndugleikin hava eftirlit við, at ásetingarnar í kunngerðini verða hildnar, og syrgja fyri, at ein árlig uppgerð verður savnað um rottufyribyrging og –týning um alt landið.

Heitt verður á hoyringspartarnar um at lata **Heilsu- og innlendismálaráðnum**, t.e. himr@himr.fo møguligar viðmerkingar til hjálagda uppskot í seinasta lagi **fríggjadagin 23. juni 2017**. Hoyringspartarnir eru eisini vælkomnir at boða frá, um ongar viðmerkingar eru til uppskotið.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Kunngerðauppskotið liggur eisini tøkt á heimasíðuni www.himr.fo

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri